

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 12 - 2011

# Føroyapallurin farin úr Kina

Herfyri fóru 16 føroyskir handverkarar til Kina at gera spildurnýggja boripallin Cosl Innovater lidnan og kláran til boriuppgávur fyri Statoil á norska landgrunninum. Arbeiðið verður gjørt umborð, meðan pallurin við egnari megi siglir úr Kina til Noregs. Cosl stendur fyri China Oilfield Services Limited. Ferðin fer at taka umleið 100 dagar og verður siglt suður um Afrika og víðari til til Europa. Cosl Drilling Europe, sum skal reka henda og nakrar aðrar pallar av sama slag, sigur nú frá, at pallurin fór frá Yantai skipasmiðjuni 21. desember við kós móti Europa. Vit hava valt at nevna hann "Føroyapallin", nú nógvir føroyskir handverkarar eru umborð og skulu tryggja, at alt riggar, sum tað skal, tá pallurin kemur til Noregs í apríl. Hetta er umleið um somu tíð sum fyrsti pallurin av hesum slagnum, Cosl Pioneer fer at seta kós móti Føroyum at seta borin í undirgrundina her. Pallurin, sum nú er farin úr Kina á veg til fyrsta steðgistaðið í Singapore, er tann næsti av íalt trimum pallum, sum kinesiska skipasmiðjan byggir til europeiska marknaðin. Fyrsti pallurin av hesum slagnum, Cosl Pioneer, borar í løtuni sín næsta brunn á norska landgrunninum. Hetta er pallurin, sum skal til Føroya í 2012 at bora á Brugduleiðini fyri Statoil, ExxonMobil og Atlantic Petroleum. Myndir - Cosl Innovater ávegis úr Kina til Europa við m.a.16 føroyskum elektrikarum og sveisarum og einum verkætlanarleiðara. Nakrir av føroysku handverkarunum, áðrenn farið varð til Kina.